**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**fyrispurning frá Páll á Reynatúgvu, løgtingmanni, í løgtingsmáli nr. 38/2014: Viðvíkjandi tyrlupalli í Sandoynni**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlan um at fáa til vega góðkendan tyrlupall í Sandoynni, og um so er nær?

2. Er støðan við verandi lendingarmøguleikum í Sandoynni góðkend, og um so er av hvørjum?

3. Hava verið hættisligar støður í sambandi við tyrlulending í Sandoynni, og um so er nær?

4. Finnast frágreiðingar, sum lýsa lendingarviðurskifti hjá tyrlu í Sandoynni?

**Svar**

## Til spurning 1 og 2

Landsverk tekur sær av tyrlupallunum landsins, sum hoyra til almennu rutuferðsluna, tvs. ferðafólkaflutning og annað.

Landið (Landsverk) rekur, sum er, teir 10 tyrlupallarnar, sum verða brúktir í sambandi við almennu rutuferðsluna við tyrlu. Av hesum eru 8 pallar góðkendir av loftferðslumyndugleikanum (Statens Luftfartsvæsen), og verður arbeitt við, at fáa viðurskiftini í rættlag fyri hinar báðar pallarnar.

Nakrir aðrir tyrlupallar eru, sum ikki eru góðkendir, eitt nú tyrlupallurin í Skopun. Teir verða einans nýttir til aðra ferðslu enn rutusamband, til dømis í sambandi við sjúkraflutning. Hesir pallar verða ikki riknir sum tyrlupallar og eru ikki fráboðir loftferðslumyndugleikunum (SLV) sum tyrlupallar í rakstri.

Tá tað ræður um tyrluflúgving til støð, har eingin almennur tyrlupallur er, og talan er um aðra flúgving enn regluliga almenna loftferðslu, so hevur tyrluskiparin loyvi til at brúka annað stað til lending. Í hesum føri áliggur tað tyrluskiparanum at tryggja sær, at viðurskiftini á staðnum eru í lagi. Tað er á hesum loyvisgrundarlag, at t.d. sjúkraflutningur við tyrlu til fleiri oyggjar verður røktur.

Tá talan er um aðra flúgving enn almenna rutuferðslu, er tað sostatt ikki eitt avgjørt krav, at øll støð, har tyrla lendur, skulu vera formliga góðkend, ella at hvør oyggj skal hava góðkendan tyrlupall. Trygdarviðurskiftini skulu tó vera í lagi.

Fiskimálaráðið hevur sáttmála við Atlantsflog um tyrlutænastu, sum umfatar eitt nú sjúkraflutning og tilbúgving. Vinnumálaráðið umsitur flogferðslu, og varðar av Atlantsflogi. Um tilráðing kemur frá hesum ella øðrum myndugleikum, um at raðfesta tyrlupallin í Sandoynni, kann málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarlógararbeiði.

**Til spurning 3**
Landsverki kunnugt hava tað ikki verið hættisligar støður í sambandi við tyrlulending í Sandoynni ella í aðrar mátar hættisligar støður, sum kunnu tilskrivast umstøðunum á plássum, har tyrlan hevur lent í oynni.

**Til spurning 4**
Landsverk er ikki vitandi um, at serlig frágreiðing er gjørd um lendingarviðurskiftini hjá tyrlum í Sandoynni.

Argir, 2. januar 2015

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður